# Fundarbók hjá Eysturkommunu 520 Leirvík

__________/_________ **Síða**

**Jóhan Christiansen, borgarst./ Erik Lervig, skr.**

**Býráðsfundur mánadagin 01. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Marita K. Joensen

**Fundurin lokin kl. 00.00**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| **1.** | **17/00000**<br>**Innkallan av varalimi**<br>Hans Mourits Foldbo, (listi C) hevur boðað frá at hann ikki kann møta til býráðsfund, og borgarstjórin hevur innkalla næstvalda á lista C sum er Marita Klein Joensen. | Einmælt samtykt at Marita Klein Joensen tekur sæti fyri Hans Mourits Foldbo. |
| **2.** | **17/00165**<br>**Ansingartøvur og framtíðar loysn í mun til hølir**<br>Í mun til ásettu normeringarnar á Brúsa og Gjáa, eru í dag ov nógv børn inni á stovnunum. Hetta er ikki ein nøktandi loysn í longdini og er neyðugt við eini loysn á trupulleikanum fram til nýggi stovnurin við Gøtugjógv stendur liðugur.<br><br>Tilmæli frá umsitingini fyriliggur, har m.a mælt verður til at arbeitt verður við at útvega eina mobila eind.<br><br>Trivnaðarnevndin mæla til at fylgja tilmælinum frá umsitingini, og at umsitingin kemur við eini kostnaðmeting av eini møguligari mobilari eind, soleiðis at ansingartørvurin er nøktaður til nýggi stovnurin við Gøtugjógv stendur klárur at taka í nýtslu. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini, og harumframt at kanna aðrar møguligar loysnir. |
| **3.** | **17/00158**<br>**Umbøn frá skúlastýrinum um at skúlin fær allan 1890-bygningin í Gøtu**<br>Áheitan frá skúlastýrinum um at skúlin fær allan 1890-bygningin til nýtslu.<br><br>Umsitingin mælir til at ganga áheitanini frá skúlastýrinum á møti.<br><br>Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, og mælir samstundis til at kommunan vísir AP-bussum á onnur hóskandi hølir, og at AP-bussar fær hóskandi freist at flyta út. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. |

**Býráðsfundur mánadagin 01. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Marita K. Joensen

**Fundurin lokin kl. 00.00**

**4.** **17/00092**

**Umsókn um loyvi at leggja veg til matr. nr. 51b í Norðragøtu.**
Umsókn er móttikin um loyvi at leggja veg frá Stallagøtu og inn á matr. nr. 51b í Norðragøtu. vegurin verður 3,0 m breiður.

Umsitingin mælir til at umsøkjari fær loyvi at leggja veg inni á egna matrikul og binda vegin í Stallagøtu.

Á fundi í Ferðslunevndini tann 18. apríl 2017 verður mælt til, at geva loyvi til koyriveg inni á matr. nr. 51b og íbinding til Stallagøtu. Vegurin og íbinding skal gerðast so tað ikki er til ampa fyri ferðslu, útsjónd og umhvørvið.

Mælt verður til, at spyrja umsøkjara, um kommunan kann keypa part av økinum við Stalla-gøtu til almenna parkering. Hugsað er uml. 6 metur oman í matr. nr. 51b.

Eingin játtan er til keyp av øki til almenna parkering.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at geva umsøkjara loyvi at gera veg inni á egnum matrikli – matr. nr. 51b – og at binda vegin í Stallagøtu. Vegurin og íbinding skal gerðast so tað ikki er til ampa fyri ferðslu, útsjónd og umhvørvið.

Einmælt samtykt at hoyra grannarnar í málinum áðrenn støða verður tikin í málinum.

**Býráðsfundur mánadagin 01. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Marita K. Joensen

**Fundurin lokin kl. 00.00**

**5.** **15/00092**

**Keyp av jørð í Leirvík, Fløtugerði**

Í sambandi við keyp av jørð í Leirvík, hevur kommunan móttikið tilsøgn frá Búnaðarstovuni, men Umhvørvisstovan, Matrikul hevur biðið um viðmæli til sundurbýti av matr. nr. 327a og 341a til kommununa frá (Matr. nr. 430, Hagaparturin ”Tindur”)

Umsitingin mælir til at viðmæla sundurbýtið av matr. nr. 327a og 341a til kommununa frá (Matr. nr. 430, Hagaparturin ” Tindur ”)

Umsókn kommununar um keyp av jørð, er tann bláa linjan í hjalagda korti, ið er uppruna umsókn um keyp av jørð til bústaðir.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla sundurbýtið av matr. nr. 327a og 341a til Eysturkommunu (matr. nr. 430, Hagaparturin “ Tindur “).

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at keypa jørð sambært uppruna umsókn, sum er tann bláa linjan sambært hjálagda korti.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**6.** **17/00153**

**Áheitan um stuðul til Umsorganarheimið Gloria**

Eysturkommuna hevur móttikið skriv frá Klaksvíkar kommunu við áheitan um ískoyti til rakstur av einum tilboðið til borgarar, sum av eini hvørjari orsøk eru illa fyri og ikki megna sítt egna gerandislív, her undir at taka hond um egnan bústað.

Trivnaðarnevndin mælir frá at ganga umsóknini á møti voð við teirri grundgeving, at hetta ikki er ein uppgáva hjá kommununum, men hjá landinum.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 01. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Marita K. Joensen

**Fundurin lokin kl. 00.00**

**7. 17/00176**

**Gummigranulat til báðar fótbóltsvallirnar í Eysturkommunu**

Tað er eitt ávíst fráfall av gummigranulat á báðum vallunum, og tí neyðugt er at fylla meir gummigranulat á vallinar.

Tilboð uppá arbeiðið fyriliggur.

Umsitingin mælir til at taka av fyriliggjandi tilboðið og veita eina eykajáttan á 263.500,00 kr. til ítróttarøkini.

Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**8. 17/00070**

**Tilbúgvingarstøð á matr. 169 á Toftanesi í Leirvík**

Støðutakan til verkætlanina sum hon fyriliggur nú.

Umsitingin mælir til at gera værkætlanina klára til útbjóðing skjótast gjørligt.

Vinnunevndin hevur viðgjørt málið og ynskir eina kostnaðarmeting av fyriliggjandi uppskoti.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum frá Vinnunevndini og at bjóða arbeiðið út skjótast møguligt.

Fíggjarnevndin mælir til at málið verður viðgjørt á býráðsfundi, áðrenn støða verður tikin í málinum

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

**9. 17/00099**

**Roknskapur 2016**

Góðkenning av roknskapinum fyri 2016 hjá Eysturkommunu.

Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna

Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi roknskap. Høvuðstølini eru:

| | |
|---|---|
| Inntøkur | 111,6 mió. kr. |
| Rakstrarútr. | 72,7 mió. kr. |

**Býráðsfundur mánadagin 01. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Marita K. Joensen

**Fundurin lokin kl. 00.00**

fyriliggjandi roknskap.

| | |
|---|---|
| Rentuútr. | 1,4 mió. kr. |
| Løguútr. | 22,7 mió. kr. |
| Afturgjalding av skuld | 5,2 mió. kr. |

Samlaða úrslitið (RLÙ) er eitt yvirskot á 15,1 mió. kr. Eysturkommuna hevur nú onga nettoskuld, men eina nettoogn á 8,4 mió. kr.

**10. 17/00046**
**Vinnupolitikkur**

Vinnunevndini mælir til at fari verður undir at gera/orða ein vinnupolitikk fyri Eysturkommunu, og mælir í hesum sambandi til at veita eina eykajáttan á 100.000,00 kr. til arbeiðið.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Gudny Langgard, Árni Jacobsen, Tollakur Joensen, Hjalti Dalheim, Hanna Jensen, Marita K. Joensen, Brandur Jacobsen.

**Atkvøddi ímóti:**
Uni Rasmussen

**11. 16/00230**
**Ferðsla eftir vegnum við Juksnará í Syðrugøtu**

Málið um ferðslu eftir vegnum við Juksnará, vegnum Úti í Bø og Matarávegnum er umrøtt og viðgjørt á fleiri fundum. Á fundi í BOB tann 20. februar 2017 var samtykt, at biðja Ferðslurevisiónina gera kanning og tilmæli uppá loysn á vegastrekkinum Juksnará, Úti í Bø og Matará vegnum.

Ferðslurevisiónin hevur gjørt uppskot sum er lagt fyri í ferðslunevndini, og ferðslunevndin mælir til at gera ymiskar broytingar.

Um broytingar hava ávirkan á grannar, skulu grannar hoyrast, ella fáa kunning um broytingarnar.

Eingin játtan er til hetta arbeiði. Mettur kostnaður er 50.000,00 kr.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 01. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Marita K. Joensen

**Fundurin lokin kl. 00.00**

tilmælinum frá ferðslunevndini og biðja um eykajáttan á 50.000,00 kr. til at fremja arbeiðið.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**12.** **17/00129**

**Kloakk- vatn- og regnvatnsskipan á ferjuleguni á Toftanesi**

Støðutakan til innkomin tilboð.

Vinnunevndin mælir til at taka av lægsta tilboðnum, sum er frá Búsetur og veita eykajáttan á 445.000,00 kr.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til fylgja tilmælinum frá Vinnunevndini.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

*Málið verður viðgjørt fyri aftulætnum hurðum.*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevnidini, byggi- og býarskipanarnevnindi og fíggjarnevndini.

**13.** **17/00013**

**Ljós til vøllin í Sarpugerði**

Tilboð er móttikið frá 3 veitarum og samskifti hevur verið við FSF um krøv v.m., somuleiðis hevur ráðgevari innan ljós og krøv til sama kannað innkomin tilboð, krøv, staðsetingar o.a.

Kanningar og samráðingar hava verið við tilboðsgevarir, FSF og ráðgevara um innkomin tilboð.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka av tilboði frá El-talvuvirkinum, og at veita eina veita eykajáttan á kr. 500.000,00 til arbeiðið

Fíggjarnevndin mælir til at tilboðið verður eftirkannað av ráðgevarar áðrenn støða verður tikin í málinum.

Málið tikið av skrá.

**Býráðsfundur mánadagin 01. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Marita K. Joensen

**Fundurin lokin kl. 00.00**

*Málið verður viðgjørt fyri aftulætnum hurðum.*

| | | |
|---|---|---|
| **14.** | **17/00140**<br>**2.viðgerð av eykajáttanum mars 2017**<br>Við 1. viðgerð á seinasta býráðsfundi tann 27/3-17, bleiv samtykt at veita eykajáttanir á kr. 8.345.000,00 kr.<br><br>Eingin broyting er frá 1. viðgerð<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð. | Einmælt samtykt eins og við 1.viðgerð |
| **15.** | **16/00310**<br>**Ummæli til frábýti frá matr. nr. 120 til matr. nr. 24 í Leirvík**<br>Umsitingin mælir til at viðmæla sundurbýti uppá uml. 183 fermetrar av matr. nr. 120 at leggja afturat matr. nr. 24 í Leirvík | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hja umsitingini.<br><br>*Árni Jacobsen var út undir viðgerðini vegna ógegni.* |

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Gudny Langgaard ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Marita K. Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

Uni Rasmussen ______________________________

**Býráðsfundur mánadagin 01. mei 2017 kl. 20.00.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Marita K. Joensen

**Fundurin lokin kl. 00.00**